# Gormur við spermi til havs

*Vaktarskipið »Gorm« var á Sørvági sunnudagin og klokkan 15.30 fór »Gormur« við hvalinum. Ætlanin er at sleppa honum 15 fjórðingar norðanfyri. Deyði hvalurin var helst ein avgustur (kallhvalur) ella spermur, sum hann eisini verður róptur*

Ólavur í Beiti

Tað tók sína drúgvu tíð at fáa hvalin av aftur sandinum í Sørvági, men hósdagin tók Sørvágs Kommuna sær so av málinum í fyrstu atløgu. Heitt var á Sørvágs Laks, um at lána teir tríggjar alibátarnar til uppgávuna at fáa togað hvalin av Sandinum og yvir móti bryggjuni, og fríggjadagin fóru bátarnir so undir uppgávuna og hongdu hvalin við bryggjuna, til vaktarskipið »Gorm« fór at koma eftir honum. Og sunnudagin kom so »Gormur« nakað fyri døgurðatíð, og um 1-tíðina hekk hvalurin longu afturúr vaktarskipinum.

Alt hetta arbeiði gekst væl í hond, tó at tað tók sína drúgvu tíð, og klokkan 14.30 lætti »Gormur« akker og sett kós norðureftir. Nakað ringur sjógvur var uttanfyri, men skiparin á vaktarskipinum Julian Martin Juul metti ikki, at nakar vandi var á ferð í sleipingini. Vaktarskipið fór at sleppa hvalinum einar 15 fjórðingar úr landi, og so er bert eftir at vóna at hann kemur ikki hendavegin aftur.

### Avgustur

Spurningurin, hvat hetta var fyri ein hvalur, er ikki loystur enn av nøkrum serfrøðingi, men onkur sørvingur helt seg síggja, at hvalurin helst hevur verið ein avgustur ella spermur. Hann máldi hvalin til um 15 metrar og metti hann nú til eini 30 tons. Eingin ivi var so um, at hetta var ein kallhvalur!

Í frálíku bókini »Villini súgdjór í Útnorðri« eftir Doretu Bloch og Edward Fuglø, stendur at lesa um avgustin, at kallhvalurin verður 15-18 metrar langur og vigar 57 tons. Kvennhvalurin verður 11-12 metrar langur. Í bókini verður eisini sagt, at eingin enn hevur borið eyga við kvennhval undir Føroyum, Íslandi, Noregi ella Danmark.

Avgustur verður í minsta lagi 60-70 ára gamal, stendur at lesa í bókini, og hann er fullvaksin 25-30 ára gamal. Og vit vita ikki, um hesin hvalurin á Sørvági doyði av elli ella um onkur tól hava verið í honum, so hann kanska er deyður av ár 2000 trupulleikanum!



*Sunnudagin fór vaktarskipið Gormur til havs við hvalinum, sum hevur ligið á sandinum í Sørvági síðstu vikuna*

# Loynipostur verður harðliga revsaður

*Tað er líka mikið, um tú sendir loynipost við ólivant, hotmail ella yahoo ella øðrum útbjóðarum, so fær Internetdeildin hjá TFL kannað, hvør sent hevur. Ófantaligur teldupostur verður meiri og meiri vanligur í Føroyum eisini*

ÓLAVUR Í BEITI

Í øðrum londum, har teldupósturin hevur verið brúktur í longri tíð enn her hjá okkum, hava trupulleikarnir av bæði »spam« og ófantaligum telduposti, sjikanerandi telduposti, verið rættiliga stórir. Og fert tú inn á heimasíðurnar hjá bæði Hotmail.com og Yahoo.com/dk, so sært tú eisini, at hesir báðir útbjóðarar gera rættiliga fitt burturúr at kunna fólk um henda møguleika og eisini, hvat tey skulu gera, um tey fáa »spam« ella ófanataligan teldupost, sjikanerandi post yvir teldu.

Á heimasíðuni hjá donsku Yahoo, stendur fitt av teksti um bæði »spam« og sjikanerandi teldupost, og revsingin fyri at senda slíkan teldupost er hørð. Útbjóðarin hevur rætt at strika teg sum nýtara og í førum eisini at lata løgregluni málið.

### Alt kann sporast

Sum skilst á Internetdeildini hjá Føroya Tele er hetta við sjikanerandi telduposti eisini við at gerast meiri og meiri vanligt í Føroyum. Og tað eru ríkir møguleikar á Internetinum at finna bæði eitt og annað amboð til tess at fáa sent ein loyniligan teldupost. Tú kanst fara inn á eina heimasíðu á Alnótini og uttan himpr senda løgmanni eini fundarboð og skriva avsendaran at vera Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri. Eisini kanst tú skipa fyri einum stevnufundi millum tvey ung, ja møguleikarnir standa púra opnir og eru rættiliga fjølbroyttir eisini, og eingi mørk eru fyri, hvat tú kanst gera.

Men heldur tú, at eingin fær at vita, hvør rætti avsendari er, so fert tú skeivur! Tí Internetdeildin hjá Føroya Tele hevur ríkar møguleikar at kanna hesi brøv, antin tey so eru send við Ólivant, Hotmail ella Yahoo ella øðrum útbjóðarum. Men so skalt tú minnast til at senda Internetdeildini upprunaliga teldupostin við brævhøvdinum, har allir upplýsingar liggja fjaldir.

### Fylgjurnar

Og revsingin fyri at senda sjikanerandi teldupost er hørð. Internetdeildin gevur tær eina ávaring og fylgir tú ikki henni, verður tú strikaður sum nýtari hjá Føroya Tele. Í ávaringini verður tú biðin um at senda eina umbering, nú skal brævhøvdið vísa tína røttu e-mail adressu, og tað skal gerast í stundini. Annars verður tú strikaður og málið sent løgregluni.

Hvussu umfatandi hetta við sjikanerandi telduposti er, er kanska ikki so lætt at siga enn, men av Internetdeildini hjá TFL verður sagt, at fleiri og fleiri brúkarar venda sær til Internetdeildina, tí tey hava fingið løgnan og sjikanerandi teldupost. Í mongum førum verður ikki sjikanerandi telduposturin sendur við, og tá er einki at gera, men tá ið Internetdeildin fær teldupostin við, verður farið til verka beinanvegin, so hesin óhugnaligi leikur steðgar.



Get Msg | New Msg | Reply | Forward | File | Next | Print | Security | Delete

Inbox — 549 messages, 1 unread

| To/From | Subject | Total | Date |
|---|---|---|---|
| Anfinn Kalls... | fundur | | 13:02 |
| Anfinn Kallsber... | uppsøgn | | 13:02 |

Subject: Uppsøgn
Date: Mon, 10 Jan 2000 13:01:06 +0000
From: "Anfinn Kallsberg, Føroya Løgmaður"
Organization: Sosialurin
To: Finnbogi Arge <finnbogi@vms.fo>

**Finnbogi Arge**
**Landsstýrismaður í Vinnumálum**

Tú verður hervið loystur úr starvinum sum landsstýrismaður

**Anfinn Kallsberg**
**Føroya Løgmaður**

*Var Finnbogi Arge nóg góðtrúgvin, so kundi hann tikið ein slíkan teldupost til eftirtektar*

**viðgjørd mynd**



# Nótavirkið slær nýggjar tónar

*Nýggja nótavirkið, sum P/F Vónin og nótaskipini hava latið bygt í Fuglafirði, fer eftir ætlan í sving um einar 14 dagar. Sambært eigarunum er virkið eitt tað mest framkomna nótavirkið yvirhøvur*

Dánjal Højgaard

Einaferð sá mestsum út sum at nótavirkið í Fuglafirði spældi sítt seinasta lag.

Í staðin verður nú farið undir eitt nýtt ørindini, tí seinni í hesum mánaðinum verður eitt spildurnýtt og nútímans nótavirkið tikið í brúk í Fuglafirði.

P/F Vónin og flestøll feløgini, sum eiga nótaskip í Føroyum, hava í felag bygt eitt nýtt nótavirki fyri góðar 9 milliónir krónur. Eitt virki, sum fer at gera og umvæla nótir - og goyma nótir fyri skipini.

### Sildin kveikir lív

Tíðin var farin frá gamla nótavirkinum í Fuglafirði, har Vónin hevur hildið til seinastu 20 árini.

Nótirnar eru vorðar størri og krevja betri verkstaðarpláss. Samstundis hava skipini havt brúk fyri plássi, at goyma nótirnar, so at tær ikki liggja og sløðast í landi og fara fyri skeyti, tá tær ikki verða brúktar umborð.

Norðhavssildin hevur verið við til at birt lív í vónina um, at grundarlag er fyri einum nótavirki í Fuglafirði. Tískil gingu P/F Vónin og sjey feløg, sum eiga nótaskip í Føroyum, saman um eina felags verkætlan. Eina ætlan, sum sum kann gerast ein fyrimunir fyri allar partar.

### Rúmligari og høgligari

Nýggja nótavirkið í Fuglafirði stendur millum trolvirkið hjá Vónini og bygningin hjá Havsbrún - Meka, tey rópa. Nýggi bygningurin er 35 metrar langur og 24 metrar breiður - í tveimum hæddum.

Í kjallaranum er 32 sonevndar krubbur, har skipini kunnu goyma nótirnar. Ovara hæddin er verkstaður, har nótir verða framleiddar og umvældar. Har er eisini ætlanin, at gera flótitrol.

Nýggja nótavirkið, sum liggur longri heima í bygdini enn gamla nótavirkið hjá Vónini, er dupult til víddar sum tað gamla. Umframt betri goymslupláss og verkstað hevur nýggja virkið eisini tekniskar hentleikar, sum gera tað nógv lættari at flyta og handfara trolini.

– Hetta virkið er á so høgum stigi, sum einki annað virkið er tað, sigur John Poulsen, stjóri á Vónini.

– Plássið er nógv betri og tað er blivið nógv meira arbeiðsligt, sigur stjórin um nýggja bygningin.

### Samogn

Okkurt um 300 fólk møttu, tá eigararnir leygardagin vístu fram nýggja nótavirkið í Fuglafirði.

Eigaraviðuriskiftini eru skipað soleiðis, at reiðaríðini sjálvi eiga krubburnar, har trol teirra verða goymd, meðan P/F Vónin annars eigur bygningin.

Bygningurin, har nótavirkið hjá Vónini hevur hildið til seinastu 20 árini skal nú nýtast til annað virksemið hjá felagnum. Har verður nú framleiðsla og umvæling av nótum til alivinnuna. Hesin partur av virkseminum hjá Vónini hevur higartil verið í leigaðum hølum í Syðrugøtu.



*Tað er vítt til veggja og høgt til loftið í nýggja nótavirkinum í Fuglafirði, sum varð sýnt fram fyri almenninginum leygardagin*
**Mynd: Jens Chr.Vang**

*Nýggja nótavirkið í Fuglafirði liggur millum Trolvirkið hjá Vónini og bygningin hjá Havsbrún, sum tey rópa Meka*
**Mynd: Jens Chr.Vang**

*Stjórin á Vónini, John Poulsen, heilsar upp á Janus Petersen, stjóra í Føroya Banka*
**Mynd: Jens Chr.Vang**



## Fakta

### Átta eigarar

Tað eru átta eigarar í nýggja nótavirkinum í Fuglafirði. Teir eru: P/F Vónin, Fuglafjørður, P/F Driftin, Gøta, P/F Krossbrekka, Gøta, P/F Varðin, Gøta, P/F Ísborg, Argir, P/F Hvalnes, Klaksvík, P/F Christian í Grótinum, Klaksvík. Sp/f E. M. Shipping, Tórshavn


## Starvsfólk til Bókhaldið

**Bókhaldið**

Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. februar ella skjótast gjørligt.
Í Bókhaldinum starvast 4 fólk. Høvuðsuppgávurnar í Bókhaldinum eru ognara-, lønar- og fíggjarbókhald.

Tann, sum settur verður, kemur í fyrstu atløgu at starvast við ognarabókhaldi, men má rokna við at luttaka í øðrum uppgávum í Bókhaldinum, tá á stendur. Talan er um avbjóðandi starv í einum mennandi umhvørvi í støðugari broyting.

**Tín førleiki:**
Tú skalt hava skrivstovu-, peningastovna- ella aðra líknandi útbúgving og hollar royndir í hesum yrki. Eisini er ein fyrimunur, um tú hevur
- førleika viðv. EDV (á brúkarastigi)
- skúla t.d. merkonom, HH ella aðra við - komandi útbúgving
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýrini, deildarleiðara, lokal 3205 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000.

Umsóknir skulu sendast til
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

SANSIR · TEL 355 355

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697